# Flestu lesa Sosialin

Pulsurin á Portalinum hevur seinastu dagarnar spurt fólk, hvat blað tey lesa oftast. Um hálvgum ellivutíðina í morgun høvdu 6.140 fólk svarað – og av teimum lesa 51% oftast Sosialin, 39% lesa oftast Dimmalætting, 8% lesa oftast Norðlýsið og 2% lesa oftast Oyggjatíðindi. Hendan kanning skal sjálvandi lesast við øllum teimum fyrivarnum, sum eru tá tað snýr seg um quick-poll kanningar á interentinum – men tær vísa tó ofta ein týðuligan tendens…




# Vilja síggja hval

Hvalaskoðan er við at gerast ein týðandi partur av íslendsku ferðavinnuni. Altsamt fleiri ferðafólk vilja sleppa at síggja livandi stórhval. Morgunblaðið skrivar, at felagið Norðursiglingar hevur ongantíð havt so nógv at gera sum í ár, og tað sama sigur eitt annað felag, sum eisini siglir við ferðafólki, sum vilja sleppa at eygleiða stórhval á sjónum. Tey bæði feløgini høvdu átta skip og bátar siglandi í summar, og annað teirra hevur gjørt av at keypa eitt skip afturat til siglingina næsta ár. Tíðin at skoða stórhval í Íslandi er frá hálvum apríl til hálvan oktober.




*- Ummælini, sum vit hava fingið frá teimum oljufeløgum, ið vit hava veitt tænastur til, meðan tey hava arbeitt í føroyskum øki, eru góð, og hesi feløg sleingja ikki bara hvat sum helst út í skrivum, sigur Eli Lassen, stjóri í ASB, Atlantic Supply Base*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Umstøðurnar í Saltangará eru góðar. Her er gott uppland og nógv betri umstøður enn í Aberdeen, haðani tær nógvu veitingarnar til oljuøkini hinumegin markið koma*

*Mynd: Runavíkar kommuna*



*Sum partur av virkseminum hjá El Teknik í Leirvík, hevur felagið eina sonevnda agent-avtalu við norska stórfelagið, Akva Group, har fyritøkan í Leirvik umboðar útboðið hjá norsku fyritøkuni. Myndin er tikin á básinum hjá El Teknik og innast høgrumegin situr Jákup Tróndheim*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# El Teknik ger uppgávur um alt landið

**Millum fýra føroyskar el-fyritøkur, sum hava bjóðað seg fram á FaroExpo, er El Teknik í Leirvík, sum hevur røtur aftur til 1991. Í dag hevur fyritøkan 9 fólk í arbeiði**

**FAROEXPO**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyritøkan El Teknik í Leirvík hevur fyri triðju ferð verið við á FaroExpo.

Tað er Jákup Tróndheim, sum eigur og rekur fyritøkuna, sum hann legði lunnar undir í 1991.

Sjálvur var hann fyrsti lærlingur hjá Jóannesi Thomsen í Fuglafirði, sum er maðurin, ið byrjaði el-fyritøkuna, sum í dag kallast JT-Electric.

Í løtuni eru 9 níggju fólk knýtt at El Teknik í Leirvík, men fyrr í ár vóru tey 13. Minkandi virksemi hevur gjørt tað neyðugt at minkað um talið av arbeiðsfólki.

- Vit kunnu ikki siga, at vit enn merkja nakað til, at virksemið í landinum er við at koma í gongd aftur, men vit vita, at gongd fer at koma á aftur, sigur Jákup.

Hann letur tó ikki illa at, men vísir á, at neyðugt er at tillaga seg broyttu umstøðurnar.

## Stórt og smátt

El Teknik hevur verið við í nógvum ymiskum verkætlanum, bæði við nýbygging, umbygging og umvælingum.

- Vit eru veitarar av innstalatiónum til ídnaðin, fiski-og alivinnuna, men vit arbeiða eisini fyri eitt nú kommunur og kommunalar felagsskapir. Hinvegin arbeiða vit ikki umborð á skipum og bátum.

Jákup vísir á, at felagið eitt nú hevur gjørt eina stóra og framkomna skipan fyri vatnviðurskiftini í Runavíkar kommunu, har tilber at síggja og stýra vatnverkunum kring um í kommununi úr eini miðstøð í Saltangará.

- Her ber til yvir netið eitt nú at steingja ella lata upp ventilar – alt eftir vatnstøðu og ynski.

Hann sigur, at við í hesi verkætlan er vatnskipanin uppat Saltangará við, men eisini skipanin á Skála, Skálafirði og Lamba.

- Ein stórur partur av hesum er programmering, og her hava vit dugnalig fólk í fyritøkuni til slíkt arbeiði, leggur hann aftrat.

Jákup Tróndheim sigur, at samstarvið við Runavíkar kommunu um vatnskipanina hevur koyrt í fleiri ár.

- Enn er útjaðarin í kommununi ikki við, eitt nú tær smærru bygdirnar, sum seinnu árini eru vorðnar partur av kommununi. Men kommunan ætlar, at hesar eisini skulu koma við, sum tíðin gongur, leggur hann aftrat.

## Størri arbeiði

Tey størri arbeiðini, sum El Teknik annars hevur fingist við seinnu árini, er umbyggingin hjá IRF í Leirvík, Tekniska skúla í Klaksvík og Fiskivinnuskúlan í Vestmanna.

- Vit hava havt uppgávur kring alt landið. Soleiðis hevur ikki bara verið nú í kreppuni, men gjøgnum øll árini, sigur Jákup.

Sum partur av virkseminum hjá El Teknik, hevur felagið eina sonevnda agentavtalu við norska stórfelagið, Akva Group, har fyritøkan í Leirvik umboðar útboðið hjá norsku fyritøkuni.

- Akva Group er veitari av øllum til aling, eitt nú fóðurskipanum, kameraskipanum, aliljósum og flakum, umframt el-instalatiónum.

Jákup sigur, at El Teknik eisini veitir tænastu fyri norsku fyritøkuna í Føroyum.

- Vit hava soleiðis sølu og tænastu fyri Akva Group í Føroyum, leggur hann aftrat.

Við sær á básinum á FaroExpo hevur Jákup Tróndheim havt ein norðmann, sum umboðar norsku fyritøkuna.

Á vinnustevuni í Runavík í gjár og í dag hevur El Teknik havt umleið 10 fundir við bæði útlendskar og føroyskar útbjóðarar.